Eyðun Mikkelsen, Sand, Renatius Corneliusen og Marie Lund úr Fiskanesi.

## Hugtakandi uppliving

Í 1961 vóri vit eisini í Føroyingahavnini. Framvegis avreiða vit fiskin sum ráfisk. Fiskiskapurin var hampuliga góður. Eg minnist eina hugtakandi hending hetta árið.

Vit komu út á Fiskanesbankan, tað var tíðliga um morgunin. Veðrið var av tí besta, ein lítil ond. Sólin kom júst tá úr havsbrúnni, so stór og blóðreyð, ikki rættuliga loysnað úr havinum. Beint ímóti sólini lá ein portugisisk skonnart og setti doriurnar út. So hvørt sum tær komu á sjógvin, hongdu tær seglið upp og fóru frá skipinum. Tær hava verið einar 70-80 í tali. Hetta var ein sera stórfingin sjón.

Eg róði annars nógv út á Fiskanesbankanum. Her var gott at rógva, serliga tá ið tað var mjørki, tí tað var so lætt at halda seg til kantin við fiskaluppinum. Ein fiskaluppur er sum eitt ekkolodd men uttan pappír. So kundu vit reka í fleiri tímar og fiska, tá ið tað rak longs eftir bankanum.

Eisini hildnaðist tað so væl, um man nabbaði allan dagin, tí at fiskurin var so stórur. Ein annar fyrimunur var at taka land í mjørka, tí vit vistu, hvar vit vóru staddir, tá ið vit fóru at sigla. Eingin radari tá. Hevði radari verið, so hevði tað mangan verið lættari, og meira hevði komið burtur úr.

Eg minnist ein morgun, vit komu út á Fiskanesbankan. Tað vóru fleiri aðrir bátar har eisini. Vit komu út á útnyrðingshornið og truffu við beinan vegin. Tað gjørdu hinir bátarnir eisini. Tað sást av tí, at allir blivu liggjandi so róligir.

Tað var ein frískur vindur høgt, og vit róku suður eftir bankanum. Tað var nógvur fiskur at fáa, men um middagsleitið slakkaði tað av, og fiskiskapurin minkaði niður í einki. Men eg sá í fiskaluppinum, at fiskur var undir bátinum.

Eg sá, at hinir bátarnir har norðuri á bankanum eisini høvdu mist kennið. Teir vóru farnir at sigla uppaftur. Eg helt so við hinar, at tað mundi duga lítið at sigla heilt norður aftur. So eg helt, at best mundi vera at blíva liggjandi og fara at kóka døgurða. Og so var gjørt, og tá ið vit høvdu etið, var aftur farið til snelluna. Tað gekk ein løta, so var kenn, og sum frá leið høvdu vit aftur tann sama góða fiskiskapin sum áður.

Tað ið fiskurin ikki tók, vísti tað seg á fiskaluppinum sum eina høvd á botni. Men tá ið fiskurin so fór upp og tók húkin, líknaði tað greinunum á einum jólatræi.

Tá ið vit fóru aftur at sigla til lands um kvøldi høvdu vit 8.000 pund, ein góður dagur. Hinir bátarnir truffu ikki við aftur.

Hetta heystið komu vit aftur heim við Karin K. Við hetta summarið eru vit fimm menn og ein kvinna, kokkurin. Umframt meg sjálvan vóru vit Mikal Tausen, Sand, Símun Joensen,Tvøroyri, Manasse Lund, Jacob Natanielsen og kokkurin Marie Lund, tey vóru av Fiskanesi.

## Riggaði væl við Karin K.

Í 1962 eri eg eisini í Føroyingahavnini, og tað er eisini við sama báti Boga. Vit komu yvir við Karin K. Hetta var eitt skip, sum vit ferðaðust nógv við millum Føroyar og Grønland. Hetta var farmaskipið hjá Kjøbro, uppkallað eftir fyrru konu hansara.

Tær flestu ferðirnar, sum eg sigldi í millum londini vóru hampuliga góðar, og sum so hendi eingin skaði. Eg minnist onga ferð, at tað var nakað serliga ringt veður á hesum ferðum. Tað sum hendi við Fursund í 1959, var ikki neyðugt. Tað var ikki siglt eftir umstøðunum, og eisini vóru bátarnir ov illa surraðir og frágingnir, áðrenn lagt var frá landi.

Fiskiskapurin var hampuligur hetta ár og vit fingu 107 tons av ráfiski. Hetta summarið var verri veður enn til dømis í 1960. Eg haldi, at vit høvdu fleiri bakkdagar enn vanligt. Eg haldi eisini, at tað man hava verið verri við fiski hetta summarið.

Vit lógu eisini fleiri túrar úti. Norðuri í Kokkoyggjunum vóru vit fleiri túrar eisini. Vit fingu fleiri hampuligar túrar har. Inni í Kokkoyggjunum var eisini ein hampuliga góð natúrhavn, har tað var gott at liggja í øllum veðri og øllum ættum.

## Báturin hekk í leysum lofti

Men allastaðni kann vandi vera á ferð. Eitt kvøldið komu vit inn í havnina. Vit fortoyaðu upp á síðuna á Giguni, bátinum hjá Karl Jespersen. Tað var flóð, tá ið vit komu inn. Einaferð onkur av okkum fór upp, tá var tað fjarað, nú hongur Gigan mestsum í leysum lofti. Tá hevur ein stórur steinur verið undir bátinum, tá ið teir løgdu hann, og sum teir ikki sóu í myrkrinum.

Mennirnir á Giguni vóru farnir í land av bátinum, tí at tað var vandi fyri at hann koppaði. Vit máttu so eisini flyta, tí at tað sá rættuliga hættisligt út. Men hon bleiv so liggjandi, og tá ið flóðin kom, so flotnaði hon aftur og einki var hent við bátinum.

Har vóru eisini nógvir aðrir bátar frá Føroyingahavnini, sum fiskaðu har norðuri.

Vit komu eisini heim við Karin K. hetta heystið.

Manningin var umframt meg sjálva Eyðun Mikkelsen, Mikal Tausen, Sand, Símun Joensen,Tvøroyri, Manasse Lund og Marie Lund, kokkur, Fiskanes.

## Longri at sigla eftir fiskinum

Vit eru komin til 1963. Vit høvdu rímuliga góðan fiskiskapi tey flestu árini, uttan tað síðsta árið, í 1968, tá bleiv so nógvur ísur seint á summarinum. Tað tarnaði fiskiskapinum so nógv, og tað kom ongantíð skil aftur á fiskiskapin. Annars var tað blivið so langt at rógva tey seinastu árini í mun til frammanundan.

Tey fyrru árini varð fiskað í nánd av Føroyingahavnini, ein tíma at sigla í longsta lagi. Men seinni bleiv tað heilt vanligt við trimum tímum. Og sigling fór við nógvari tíð, og ikki var tað altíð veður at fara so langt.

Annars haldi eg, at vit øll árini burdu fingið eina líkinda inntøku í mun til tann fiskiskap, sum vit høvdu. Men prísurin var heilt út av lagi vánaligur. Eg rokni við, at teir hava lagað prísin hjá bátunum eftir tí, sum støðin skuldi hava fyri at klára seg. Og tað var ikki smávegis, tí hon var bæði stór og dýr.

## Løgið veður

Eg var úti fyri løgnum fyribrigdum tey árini eg var í Grønlandi.

Eitt av hesum var ein dagin, vit lógu suður fyri Marrak, tað var fínasta veður. Hetta mundi vera mitt í 60-unum. Vit lógu út fyri boðanum, sum er útsuður úr Amerikanaraoynni.

Tá hoyri eg í móttakaranum, at bátar, sum vóru staddir longur norðuri fyrst við Kokkoyggjarnar og síðani longur suðuri á Bokoyggjagrunninum, tosaðu sína millum um, at teir fóru at sigla til lands, tí tað var blivið stormur.

Hjá okkum var sum sagt fínasta veður. Men norðuri á luftini stóð eitt spiralformað skýggj eftir øllum hválvinum frá innlandsísinum eystanfyri til havsbrúnna vestanfyri. Og tað kom skjótt suður eftir. Vit hoyrdu eisini bátarnar norðan fyri boða frá, at nú var stilli aftur.

Tá ið hetta góða skýggj var beint uppi yvir okkum bleiv tað kolandi stormur. Tað var eitt belti so langt sum eyga rakk, men bara einar 2-300 metrar breitt sum vindurin var í. Vit skuldu fara at draga upp, men áðrenn vit høvdu fingið tíð til tess, var tað farið fram við. Tað var, sum tá ið man sær ein helikoptara koma tætt niður ímóti sjónum, tá ið tað er blika stilli. Hetta var møguliga eitt slag av einari tyfon.

Við hetta summarið vóru umfram meg sjálvan Mikal Tausen, Sand., Símun Joensen, Tvøroyri, Manasse Lund, Rebekka Lund, kokkur, Fiskanes.



*Her liggja vit við brúnna framman fyri skúrin hjá mær í Foyringahavnini. Í bátinum lítli Jens Kristjan, eg sjálvur og Marta, á brúnni Elias Antoniusen. Nú eru vit við at flyta suður í Grátufjørðin*



*Hetta er frá sama túri sum vit fara suður í Grátufjørðin. Her draga vit eina jollu á sjógv sum vit skullu hava suður við. Hetta er inni í Dagmarsvík*



*Hetta er tað várið sum vit fluttu suður í Grátufjørðin, ísurin lá einar 200 metrar út úr víkini. Her liggur Líðarenni við ískantin. Vit eru í ferð við at draga tilfarið til skúrin inn í víkina í einari jollu. Pápi mín stendur á dekkinum, eg sjálvur mitt í myndini og tríggir grønlendingar*

**Komandi partur**

Í komandi parti verður greitt frá tí mest óhugnaliga sum hendi alla hesa útróðrartíð. Ein føroysk genta hvarv og sást ikki aftur